**Til kommunal samstørv, kommunur v.fl.**

**Argir**, 2. desember 2014

**J.Nr.:** 090837-002/14-4
(at tilskila í svari)
**Tygara skriv:**

**Viðgjørt:**

## Roknskaparframløga o.t. fyri kommunal samstørv

Kommunalu samstørvini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum Almannamálaráðið hevur góðkent sambært § 11 í Ll. nr. 20 frá 7. apríl 2014, eru øll javnbjóðis samstørv sambært § 6, stk. 2, nr. 1, í somu lóg.

Talan er um nýggjar, tvørkommunalar eindir, sum hava egna løgfrøðiliga tilveru. Kommunalu samstørvini skulu tí m.a. vera skrásett í vinnuskránni hjá TAKS við egnum v-tali, og skulu hava øll eyðkenni, sum annars eru fyri løgfrøðiligar eindir.

Samstørvini hava sjálvstøðugar roknskapir við egnari fíggjarstøðu – tvs. aktiv og passiv.

## Ásetingar um roknskap

Sambært § 2, stk. 4, í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 (kommunala roknskapar-kunngerðin) ger landsstýrismaðurin av, um kommunalt virksemi, sum er undir ræði hjá fleiri kommunum, skal verða partur av roknskapinum hjá eini kommunu ella skal hava sjálvstøðugan roknskap sambært somu kunngerð. Við fráboðan, dagfest 16. juni 2014, hevur landsstýrismaðurin sum kunnugt tikið avgerð um, at kommunal samstørv, sum eru sett á stovn sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. skulu hava sjálvstøðugan roknskap, og sostatt ikki vera partur av roknskapinum hjá eini kommunu. Hetta hevur m.a. við sær, at roknskapirnir fyri kommunalu eldrasamstørvini hvør í sínum lagi verða partur av samlaða kommunuroknskapinum, sum Fíggjarmálaráðið ger, og ikki verða rapporteraðir sum ein integreraður partur av einum verandi kommunuroknskapi.

Samstarvsroknskapurin fevnir um alla eldrarøkt, heimatænastu v.m. Í teimum førum, har ein kommuna heldur viðlíkahaldið av bygningi, sum verður brúktur til sambýli ella røktarheim, og leigar bygningin út til samstarvið, skal ávikavist leiguinntøkan og leiguútreiðslan takast við sum inntøka hjá kommmununi og sum útreiðsla hjá samstarvinum. Hetta verður gjørt á serligum undirkontum ætlaðar til endamálið, og transaktiónirnar skulu síggjast brutto í báðum roknskapunum.

## Eyðmerking av kommunalu samstørvunum (samstarvsnummar)

Kommunalu samstørvini innan eldrarøkt, heimatænastu v.m. fáa hvør sítt samstarvsnummar, sum verður brúkt í sambandi við skrásetingina í samlaða kommunala roknskapinum, sum Fíggjarmálaráðið varðar av.

| Samstarvsnr | Samstarv | Heiti á samstarvi |
|---|---|---|
| 711 | 1 | Norðoya Bú- og Heimatænasta |
| 721 | 2 | Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar Kommunu |
| 731 | 3 | Økistænastan við Skálafjørðin (Runavíkar, Nes og Sjóvar kommunur) |
| 741 | 4 | VEKS (Vestmanna, Eiðis, Kvívíkar og Sunda kommunur) |
| 751 | 5 | Heimatænastan í Vágum (Sørvágs og Vága kommunur) |
| 761 | 6 | Økistænastan í Sandoyar Sýslu |
| 771 | 7 | Bú- og Heimatænastan í Suðuroy |

Kommunalu samstørvini skulu leggja fíggjarætlanirnar í búskettskipanina hjá Fíggjarmálaráðnum eftir sama leisti sum kommunurnar.

Fíggjarætlanarstrongurin hjá samstørvunum skal vera sum í yvirlitinum niðanfyri, har **x** merkir, at samstarvið setur nummarið á samstarvinum í staðin (sí omanfyri, har t.d. samstarvið í Suðuroy hevur nr. 7):

## Uppseting av fíggjarætlanini fyri kommunalu samstørvini

| SS # | Virk.øki | HK | UK | J-slag | Frágreiðing um høvuðskontur og undirkontur | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 07x1 | 2161 | 0x1 | 10 | ÓJ | HK # 1 | Flytingar frá kommunum til samstørv | | |
| 07x1 | 2161 | 0x2 | 10 | RJ | HK # 2 | Gjøld frá búfólki á stovnum | | |
| 07x1 | 2161 | 0x3 | 10 | RJ | HK # 3 | Fyrisiting av eldrarøkt | | |
| 07x1 | 2161 | 0x4 | 10 | RJ | HK # 4 | Eldrarøkt | UK # 10 | Heimatænasta |
| | | | 20 | | | | UK # 20 | Eldrabústaðir |
| 07x1 | 2161 | 0x5 | 10 | SJ | HK # 5 | Ansingarsamsýning | | |
| 07x1 | 2161 | 0x6 | 10 | RJ | HK # 6 | Viðlíkahald o.t. | UK # 10 | Viðlíkahald |
| | | | 20 | | | | UK # 20 | Leiga |
| 07x1 | 2161 | 0x7 | 10 | LJ | HK # 7 | Løgur | | |

Merking til játtanarsløg:
ÓJ = Ógreinað játtan, RJ= Rakstrarjáttan, SJ= Stuðulsjáttan og LJ= Løgujáttan

Játtanirnar eru bindandi á høvuðskontustigi.

## Standardroknskaparkontur til flytingar hjá kommunalum samstørvum

Flyting frá størru kommununum, sum innrapportera til Fíggjarmálaráðið sambært § 10, stk. 2, í kommunalu roknskaparkunngerðini, skal takast við á standardroknskaparkontu 7640 sambært kontuskipan kommunanna.

Flyting frá kommunum, sum ikki innrapportera sambært § 10, stk. 2, skal takast við á standardroknskaparkontu 6390.

## Roknskaparuppseting hjá hjá kommununum við atliti at eldraøkinum

Í sambandi við útleggingina av heimatænastu, eldrarøkt v.m. skulu ávísar broytingar eisini gerast í kommunalu roknskaparuppsetingunum.

Kommunurnar fáa nýggjar inntøkur og skulu hesar bókast á nýggjar høvuðskontur, ið eru:

- 52.14.xxx Skattur av eftirlønarinngjøldum
- 52.51.xxx Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir
- 52.52.xxx Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið

Har **xxx** er viðkomandi kommunununmmar, t.d. 700 fyri Klaksvíkar kommunu.

Virksemið sambært lógini fer at liggja í samstarvsroknskapinum, tí skulu kommunurnar bara taka flytingar til og frá samstarvinum við í kommunala roknskapin. Høvuðskontan at brúka í hesum sambandi er:

- 21.61.xx2. Eldrarøkt UK # 10 Gjald til samstarv<br>UK # 20 Gjald frá samstarvi fyri leigu

Har **xx** er tvey tey fyrstu tølini í viðkomandi kommununummari, t.d. 21.61.702 fyri Klaksvíkar kommunu.

Tórhavnar kommuna hevur ikki flytingar til og frá samstarvi, tí “samstarvið” í hesum føri er tað sama sum kommunan.

## Standardroknskaparkontur hjá kommunum

Flytingar til samstarvið skulu takast við á standardroknskaparkontu 7140 sambært kontuskipan kommunanna, og møguligar flytingar frá samstarvinum skulu takast við á á standard-roknskaparkontu 7640.